## DAGSINS MEINING

# Torpederað sítt egna flaggskip

Í útvarpinum týsdagin slepti fíggjarmálaráðharrin seinastu bumbuna hjá fullveldissamgonguni. Ella rættari hann avmonteraði hana. Einki uppskot um búskapargrunn kemur í hesi setuni. Búskapargrunnurin var annars fullveldisflaggskipið. Sjálvt hjartað í hesi ætlan - eftir stuttari tíð at yvirtaka øll málsøki og kvetta við Danmark. Tað var hesin grunnur, ið skuldi vera bolverkið um fullveldið og sum skuldi fylla tess karmar út. Embætisfólk og samgongufólk hava brúkt tíð og orku uppá at skræddaraseyma ein búskapargrunn at hýsa fullveldinum í. Í henda grunn skuldi yvirskot í landskassanum fara, blokkurin úr Danmark, sølan av almennum ognum, og síðani inntøkur frá oljuvinnuni.

Hóast Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin saman við Sjálvstýrisflokkinum frá byrjan vóru samdir um at reka ein politikk móti fullum suvereniteti, hava vit sæð, hvussu stór ósemjan kortini hevur verið. Hetta er tilfar til eina surrealistiska bókaritgerð. Endin var so eisini, at umboðini fyri bæði Ffl. og Sfl. vildu als ikki vita av tí fullveldisgongd, sum Tfl. hevði sett sær fyri at røkka – kosta hvat tað kosta vildi. Vit hava verið vitni til, hvussu ein fólkaatkvøða bleiv av ongum. Hvussu ein niðurgerðing av Heimastýrislógini brádliga bleiv til ein bjargingarplanka og nú hvussu sjálvt flaggskipið - Búskapargrunnurin – varð lagt fyri teym. Ella rættari – varð torpederað av upphavsfólkunum sjálvum.

Tað, sum Karsten Hansen stóð eftir við av upprunaliga Búskapargrunnuinum, var í veruleikanum einki – tann bera luft. Nú var bert talan um ein grunn, sum skuldi innihalda møguligar komandi oljuinntøkur. Hví gera so nógv hóvasták burtur úr einum grunni , sum einki innihald er í? Tað mugu Gudarnir vita. Hetta er kanska eisini júst symptomatiskt fyri samgonguna – at man alla tíðina - tá man hevur mist alt á gólvið - blívur við at halda somu samgongu á lívi við ongum innihaldi.

At byggja ein Búskapargrunn uppá komandi oljuinntøkur er ein løgin og ullint støða. Neyvan er nakar ósamdur í, at koma oljupengar, skulu teir ikki oyslast burtur men koyrast í grunn. Hvussu teir skulu brúkast ella útgjaldast átti ikki at verið nakað stríðsmál her og nú, tí vit vita als einki um lønandi oljuframleiðsla verður. Verður hon, so liggur hon eini 6 – 8 ár frammi í tíðini. Tí hava vit góða tíð til at endurskoða ætlanina um henda grunn, so tað fæst breið fólkslig semja um hann.

Tað er ábyrgdarleyst í verandi støðu at gera henda grunn til eitt lyklamál. At fíggjarmálaráðharrin hevur sannað hetta er gott, og tí eiga vit at lata tað upp til komandi løgting at gera av, hvat vit vilja við hesum. Nú má løgmaður skriva út val ella í hvussu er steðga tí misbrúki av Føroya løgtingi, sum í løtuni fer fram. Tá var heiðurligari og ærligari at stongt tingdyrnar og lýst valstríðið at verða byrjað.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Skilagóð stovnsrøkt – einki stemmufiskarí

**Skopunar Útróðrarfelag**
*Skopun, 23. februar 2002*

Aðalfundur Skopunar Útróðrarfelags vil við hesum gera sína áskoðan í sambandi við friðing vestan fyri Sandoynna kunnuga:

- Friðingin er skilagóð, sum liður í varveiting av gýtingarstovninum.
- Hartil er at siga, at eins og norðanfyri hava vit eisini "troling á landleiðini" her, umframt ovurstóran línuflota norðaneftir, sum øll árini frammanundan hevur kunna ligið á sjálvari gýtingarleiðini, sum nú er vorðin friðað, og hevur harumframt gjørt, at snellubátarnir mugu út á 12 – 14 fjórðingar úr landi, tí ikki er roynandi innanfyri fyri línu.
- Dentur verður lagdur á, at hetta als einki hevur við partapolitikk at skaffa.

# Sjálvstýri Føroya fólks

**Andras Miðskarð**



Alt síðan henda loysingarsamgonga tók við landsins leiðslu, hava vit bæði hoyrt og sæð nógv á prenti, um tann arbeiðssetning.

Sum loysingarsamgongan setti sær fyri at reka. Men hugtakið "Sjálvstýri Føroya fólks", er væl ikki til í dag? Eftir at fólkið hevði talað við fólkaatkvøðuna til fólkatingsvalið, misti loysingarsamgongan meirilutan í fólkinum, og fyri stuttum hevur anstøðan á tingi fingið ein tinglim frá loysingarsamgonguni. Tað vil aftur sig, at stórur meiriluti av Føroya fólki vrakaði hugtakið "Sjálvstýri Føroya fólks".

Men Føroya fólk valdi ella legði upp til eitt nýtt hugtak, sum vit av røttum kunnu kalla "Samband Føroya fólks". Ein kann tí spyrja hví? Jú, mær tykir, at longu í fyrsta ári av hesum samgonguskeiði komu ætlanir fram, sum fólkið ikki kundi taka undir við. Tingfólkini hjá hesu loysingarsamgongu tóku heldur ikki undir við ávísum ætlanum. Her hugsi eg um ætlanina hjá fólkaflokkinum, við eini útjaðaraloysingarsamgongu um tingmaðurin í norðoya valdømi Jógvan við Keldu stóð fyri. Men útjaðarasamgonguni var kortini ikki lív lagað. Til tross fyri, at Jógvan við Keldu bjóðaði hesari útjaðaraloysingarsamgongu frían skrivara frá umsitingini í Klaksvíkar Býráð, sum skattaborgarin her í Klaksvík helst skuldi gjalda fyri (tað má sigast at vera langt úti). Men tíbetur fór útjaðaraloysingarsamgongan sama veg sum "Sjálvstýri Føroya fólks".

Eisini minnast vit fólkaatkvøðuna, sum fólkaflokkurin ikki tordi at halda. Tí fóru bæði hugtakið "Sjálvstýri Føroya fólks", "útjaðaraloysingarsamgongan" og fólkaatkvøðan fyri bakka. Fólkaatkvøðan, sum var ætlað at hava ár 2012, er helst farin har pipari grør.

Eg vil tí heita á veljaran um at verja borg fyri nýggja hugtakinum "Samband Føroya fólks". Sum ein meiriluti av Føroya fólkið ruddaði slóð fyri og staðfesti við ikki minni enn sjeytummaseymi við fólkaatkvøðuna til fólkatingsvalið.

Gott løgtingsval.

# Trivnaðarmál á dagsskránna

**Leivur Hansen**
*Løgtingsvalevni tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi*



Tað kann ikki vera rætt, at trivnaðarmál verða brúkt sum livibreyð og kastibløka millum politisku flokkarnar undan hvørjum vali.

Hesum kunnu vit sleppa burturúr við at gera eldrarøkt, barnaansing, bústaðarmøguleikar v.m. til ein RÆTT hjá øllum, sum ynskja tað.

Á sama hátt sum øll hava rætt til pláss í fólkaskúlanum, til sjúkraviðgerð og heimahjálp.

Júst við hesum í huga hevur Tjóðveldisflokkurin gjørt av at seta trivnaðarmálini ovast á politisku dagsskránna tey næstu fýra árini.

Uppgávurnar skulu loysast millum land og kommunur – og arbeiðsmarknaðin.

Semjurnar skulu m.a. tryggja, at

1) akutti tørvurin á eldraøkinum verður nøktaður innan fýra ár
2) heimahjálpin verður víðkað við eini døgnhjálparskipan
3) barnsburðarfarloyvið verður longt til eitt ár
4) ansingartrygd verður veitt eftir barnsburðarfarloyvið
5) bústaðartørvurin og tørvurin á alternativum bústaðarmøguleikum verður nøktaður, og at
6) íbúðarviðurskiftini hjá fólki við serligum tørvi somuleiðis verða loyst.

Seinastu fýra árini hava vit skapt búskaparliga grundarlagið til at gera varandi loysnir fyri trivnaði og vælferð í Føroyum.

Ein verulig loysn á trivnaðarmálunum er samstundis fortreytin fyri framhaldandi vinnulívsmenning og búskaparvøkstri í Føroyum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Talstrev

### Als eingi kravboð

**Eyðun á Borg**
*Vegna talfylkingina*



Talstrevið er byrjað, og neyvan ber til at steðga tí aftur.

Talfylkingin hevur sjálvandi ikki sett fram nøkur kravboð um føroysku tølini. Í fyrstu syftu verður bert mælt til at fundast um talbroytingina. Høvdu so haraftrat Gekkur og V4 møguliga kunnað tikið undir við talbroytingini, so var ómetaliga nógv vunnið.

**Føroya skúli**
At fingið tann spildurnýggja Føroya skúla at lært sínar 1. floks næmingar føroysku tølini, tá teir byrja í skúlanum, hevði helst eisini verið eitt frálíkt hugskot.

**Stór undirtøka fyri føroysku tølunum**
Annars er tað rættiliga ófatiligt, at onkur skal halda u.l. 40% fyri føroysku tølunum vera lítla undirtøku (um fólk annars líta á slíkar teldukanningar).

Sum spurningurin varð settur, var undirtøkan sera stór og eggjar avgjørt til at halda fram við talstrevinum. Kanska er enntá meiriluti fyri okkar ætlanum!?!

Høvdu tey, sum á sinni stríddust fyri føroyskum máli, sett seg a bíðað eftir einum meiriluta millum manna og milum løgtingsfólk, so høvdu vit ikki verið komin langt við málstrevinum. Okkurt eitur hugsjónir.

**Talfrælsi**
Fólk kunnu sjálvandi brúka tey tøl, sum tey hava hug til. Neyvan fari eg heim til Havnar at rópa á B36 (tríatiseks), og eg fari heldur ikki at biðja onnur gera tað; men vil onkur tað, so er tað eisini frálíkt.

Lat okkum ikki gloyma, at ætlanin er at fara frá nøkrum, sum er stirvið og øvugt (trý og hálvfjerðs), til nakað, sum er lættari, einfaldari og smidligari (sjeytitrý)!!

Kundu vit fyrst fingið 1. floks børn at lært seg føroysku tølini, so høvdu helst allir føroyingar uttan kravboð sagt sjeytitrý um ikki so øgiliga nógv ár.

Tó hevði undirtøka frá fjølmiðlafólki, málfólki, lærarum og øðrum einstaklingum komið sera væl við longu nú.

# Landssjúkrahúsið og børnini

**Jógvan Arge**
*Valevni tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi*



Nú hevur Jógvan við Keldu aftur ilt av Tórshavnar Kommunu og Landssjúkrahúsinum. Hetta liggur so djúpt í honum, at hann stundum fær herðindi.

Nú vil hann ikki, at børn hjá starvsfólkum á Landssjúkrahúsinum skula fáa teir ansingarmøguleikar, sum neyðugir eru, um sjúkrahúsverkið skal halda uppi einum kappingarførum landssjúkrahúsi í Føroyum.

Søgan er sera einføld. Landssjúkrahúsinum vantar í løtuni ansingarpláss til børnini hjá teimum starvsfólkum, sum skula bera sjúkrahúsinum uppi.

Landssjúkrahúsið vil fegin loysa trupulleikan við sjálvt at fara upp í bygging av ansingarstovni, so allar Føroyar kunna hava eitt so gott landssjúkrahús sum møguligt.

Tórhavnar Kommuna hevur verið sinnað at fara í samarbeiði við sjúkrahúsverkið at loysa hendan álvarsama akutta trupulleikan.

Hugsanin hevur higartil verið at gera tað á nakað sama hátt, sum gjørt er saman við Føroya Tele, ið hevur goldið sín part av barnagarðinum Kurlu.

Her hevur arbeiðsplássið hjá foreldrunum tikið upp á seg at gjalda 80 prosent av íløguni í barnagarðin og kommunan 20 prosent. Av rakstrinum rinda foreldrini 30 prosent og kommunan 70 prosent.

Afturfyri fáa foreldur, sum arbeiða hjá Føroya Tele, framíhjárætt til at fáa síni børn inn á stovnin, og hetta hevur longu verið til gagns fyri Føroya Tele — og hevur stytt um bíðilistan hjá kommununi.

Nú hevur Landssjúkrahúsið trupulleikan. Landssjúkrahúsið heldur seg ikki kunna bíða, til Tórshavnar Kommuna við síni trongu íløgukvotu nøktar allan ansingarstørvin í Havn, men vil taka stigið sjálvt - saman við kommununi.

Hetta er sostatt ikki ein spurningur um, at landið aftur skal leggja seg út í tey generellu barnaansingarmálini, sum eru løgd út til kommunurnar.

Hetta er ein spurningur um, at enn eitt arbeiðspláss í Havn, sum tænir øllum landinum, undir serligum umstøðum er sinnað til at veita sínum starvsfólkum eina serliga tænastu til tess at virka optimalt til frama fyri allar føroyingar. Og kommunan vil fegin hjálpa til.

Tað er tað harmiligt, at politikarar sum Jógvan við Keldu ikki eru komnir longur, enn at brúka Landssjúkrahúsið og tess starvsfólk í Havn sum lokalpolitiskar kastibløkur.

Øll tey, sum hava brúk fyri Landssjúkrahúsinum, hava eisini betri uppiborið.

# Gaman at ferðast saman

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður*



"Hjún, har annað hevur alla inntøkuna, verða at javnstilla við hjún, har bæði hava inntøku."

Hetta skriva samgongufólk undir fyri skjótt fýra árum síðani. Sjálvt um Bjarni Djurholm og Finnbogi Arge hava sitið á formansessinum í fíggjarnevndini, er onki hent.

Føroya løgting hevur spurt eftir málinum. Føroya løgting hevur enntá atkvøtt fyri eini samtykt um at samskatta hjún. Men onki hendir. Í Føroyum er tað nevniliga so, at eitt orð er ikki eitt orð, tá tað bara stendur í einum samgonguskjali.

Fyri øll hjún, sum eg kenni, er tað so, at man er ein eind. Hjún hava sama búskap, sama húsarhald. Hjá summum fara bæði út at arbeiða, hjá summum bara annað. Men tað er stórur munur á, hvussu fólk verða skattað. Hevur konan eina góða inntøku, meðan maðurin fer á skúla, so verður skatturin nógv hægri, enn um tey tilsamans vunnu tað sama, men bæði høvdu líka stóra inntøku. Á sama hátt, tá maðurin hevur fingið eitt krevjandi starv við góðari løn, og konan velur at arbeiða heima.

Tær og teir, sum av fríum vilja brúka tíð saman við børnunum, samstundis sum tey eitt nú taka sær eina útbúgving, lesa og gera uppgávur, meðan børnini sova, tey verða revsað í skattinum.

Tá landið veitir fólki tænastur ella pensjónir, verður tað vanliga minni til tey, sum er gift. Tað er løgið, at revsa familjurnar á henda hátt, skatta tær harðari og gjalda teimum minni út. Tað er ikki akkurát tað, sum familjunum á okkara døgum tørva.

Framyvir skulu hjún skattast sum ein eind. Tey gera jú alt annað sum ein eind.

# Er hond tín sjúk?

**Jenis av Rana**



Møguliga ein løgin yvirskrift, men eg hugsi um, hvat tú gert, tá ein likamslutur er sjúkur- t.d. hondin. Jú, svarar tú- eg leiti til læknan. Hesin kannar meg, roynir at finna orsøkina, eydnast tað ikki sendir hann meg vónandi víðari til serfrøðingar.

Jú, so er, og alt hetta hevur eittans endamál- at finna grundleggjandi trupulleikan, loysa hendan og harvið veita neyðugu hjálpina.

**Hvat gera vit so við barnið?**
Hvørt ár koma kvinnur og hjún til lækna, tí tey ikki síggja seg før fyri at bera barnið, hon ber undir belti, í heim.

Hjá 50 av hesum høggur man "hondina" av- man tekur barnið úr trygga umhvørvi tesslívmóður mammunar- og noktar tí rættin til lívið. Í staðin fyri at seta kanningar í verk fyri at finna grundleggjandi trupulleikan og loysa hendan, so velur man í hesum føri at skera líðandi likamslutin (barnið) burtur.

Hví?

Hví hendan ágang móti mammuni, foreldrum og barninum?

Grundleggjandi trupulleikarnir í hesum føri eru allir lættir at loysa. Teir eru so gott sum altíð sosialir, fíggjarligir, bústaðarligir v.m., sera einfaldir, sammeta vit við teir trupulleikar, ið volda nógvar av vanligu likamstrupulleikunum.

**Maria, móðir Jesusar!**
Hon var ógift, ung, fátøk, men gjørdist við barn. Hon uppfylti allar tær treytir, sum í dag høvdu ført hana beinleiðis inn á sjúkrahús okkara at fingið barnið burturtikið, um hon bað um tað. Og tá hon so omaná alt segði seg hava havt vitjan av eingli, og at barnið varð gitið av Heilaga Andanum- ja, tá var sakin heilt greið, hon hevði fullan rætt til fosturtøku, hon var jú vorðin heilavill.

Men Maria var hin fyrsta, sum bjóðaði Frelsaranum vælkomnum í lív sítt! Hon tók ímóti honum, hýsti honum, bar hann í heim og aldi hann upp.

**Vælsignað verði Maria!**
Ei undur í at mótstøðumaðurin hevur leika í síðan hendan daginmóti óføddu og føddu børnunum. Hann byrjaði beinanvegin, gjøgnum Heródes myrdi hann í túsundatali av javnaldrum Jesusar, upp gjøgnum tíðirnar hevur hann hildið á, og í dag slátrar hann dagliga í hundratúsundatali í móðurlívi. Eg ivist onga løtu í, at tað er blint hatur móti Jesusi, ið drívur verkið.

**Dreymur okkara í Miðflokkinum**
Vit síggja fram móti tí degi, tá elskaða, vakra móðurland okkara, Føroyar, verður fyrsta staðið í heiminum, har øll tey børn, ið gitin verða, verða boðin vælkomin til lívið. Síggja fram móti tí degi, tá Føroyar verða landið, har politikarar og læknar seta æru sína í at veita mammum, foreldrum og børnum ta hjálpina, ið skal til fyri at gera føðiundrið og gleðina fullkomna.